LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 30. september 2020
J.Nr.: LUM-26- 20/00038-18
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi trygdini, tá skip hjá Strandferðsluni leggja at í Svínoy og Fugloy**

Tann 18. februar 2020 sendu tygum umboðsmanninum eitt brot úr Degi og Viku frá 17. februar 2020, har stjórin í Sjóvinnustýrinum varð spurdur um trygdina, tá skip hjá Strandferðsluni leggja at í Svínoy. Samanumtikið svaraði stjórin, at hóast tað kann síggja ótespiligt út at leggja at í Svínoy, er tað ikki ótrygt, og at Sjóvinnustýrið og Strandferðslan hava skipað fyri, at eingi óráð verða tikin.

Samstundis settu tygum nakrar spurningar, sum eg sendi til Umhvørvis- og vinnumálaráðið. Eg spurdi samstundis, um Umhvørvis og vinnumálaráðið metir, at viðurskiftini, tá skip hjá Strandferðsluni leggja at í Svínoy eru nøktandi, ella um nakrar broytingar mugu gerast.

Tann 2. apríl 2020 fekk eg hesa frágreiðing frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:

> **“Viðvíkjandi trygd, tá skip leggja at í Svínoy og Fugloy**
> ...
> Løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum hoyrir undir málsøkið hjá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum. Ábyrgdin av eftirlitinum sambært lógini um trygd á sjónum við skipum og bátum er løgd til Sjóvinnustýrið, her undir eisini eftirlitið við skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins.
>
> Leiðslan á Strandfaraskipum Landsins hevur ábyrgdina av, at krøv, sum verða sett til bátar og skip stovnsins sambært løgtingslóg um trygd á sjónum, verða fylgd, og evsta ábyrgd fyri hesum liggur hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Í Føroyum eru 5 landshavnir, sum Landsverk hevur ábyrgdina av, meðan kommunurnar reka hinar havnirnar og lendingarnar.
>
> Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur biðið Sjóvinnustýrið um eina frágreiðing um tey viðurskifti, sum ein borgari reisur í skrivi til Løgtingsins umboðsmann tann 18. februar 2020, og um tey viðurskifti, ið Løgtingsins umboðsmaður nú spyr um.
>
> Sambært frágreiðing frá Sjóvinnustýrinum, ið var Umhvørvis- og vinnumálaráðið í hendi tann 27. mars 2020, eru skipini hjá Strandfaraskipum Landsins fevnd av krøvum um ISM (International Safety Management Code), og skulu tey hava eina SMS-skipan (Safety Management System). Hetta inniber, at stovnurin skal hava greiðar leiðreglur til skiparan soleiðis, at hann hevur greiðar karmar

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

at virka undir, og krav er um, at ein váðameting er gjørd. Sjóvinnustýrið upplýsir, at Strandfaraskip Landsins hevði gjørt eina váðameting fyri sigling til Fugloyar og Svínoyar, áðrenn vanlukkan hendi, sum kravdi eitt mannalív í Fugloy tann 11. mars 2018. Klassin hevur eftirlit við, at hesi viðurskifti hjá Strandfaraskipum Landsins eru í ordan.

Í váðametingini, ið tá fyrilá, varð mett um eginleikarnar hjá Rituni í mun til atløguviðurskiftini í m.a. Svínoy og Fugloy. Sambært váðametingini, sum er endurgivin í skaðafrágreiðing frá Den Maritine Havarikommission, dagfest 13. august 2018, eru atløguviðurskiftini alt frá óhóskandi til vánalig, og fyri ferðafólk undir 7 ár og ferðafólk við rørslutarni verður víst til tyrluna. Frágreiðingin frá Den Maritine Havarikommission er at finna á heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum.

Sjóvinnustýrið upplýsir, at fundur var við Strandfaraskip Landsins tann 17. februar 2020, við tí endamáli m.a. at viðgera atkomuviðurskiftini á smærru oyggjunum, og hvørji átøk eru sett í verk síðani vanlukkuna í mars mánaði í 2018. Á fundinum greiddi leiðslan á Strandfaraskipum Landsins m.a. frá teimum átøkum, sum eru gjørd síðani, og hvat hetta hevði havt við sær av avlýsingum o.a. Avtalað varð, at Strandfaraskip Landsins skuldi senda váðametingarnar til Sjóvinnustýrið. Hesar vóru stovninum í hendi seinni sama dag. Sjóvinnustýrið metti ikki váðametingina fyri Rituna vera nøktandi, og bað tí Strandfaraskip Landsins um ein nýggjan fund um málið.

Sjóvinnustýrið og Strandfaraskip Landsins hittust aftur á fundi tann 4. mars 2020 fyri at tosa um endurskoðan av váðametingini. Sjóvinnustýrið gjørdi á fundinum greitt, hvørji ítøkilig viðurskifti skulu vera við í einari endurskoðaðari váðameting. Endurskoðaða váðametingin skuldi vera stovninum í hendi í seinasta lagi tann 17. mars 2020.

Síðani fundin tann 4. mars 2020 hevur nógv samskifti verið millum Sjóvinnustýrið og Strandfaraskip Landsins. Sjóvinnustýrið hevur sett krav um, at nýggju váðametingarnar síggjast aftur í SMS-skipanini hjá skipinum, so skiparin kann fáa greiðar karmar og leiðreglur at virka undir.

Í mun til spurningin frá Løgtingsins umboðsmanni, hvørt trygdarviðurskiftini eru nøktandi ella broytingar mugu gerast, skal sigast, at krav nú er sett um endurskoðan av váðametingini fyri Rituna, og um at endurskoðaða váðametingin verður sett í verk soleiðis, at reiðarí og skipari fáa virkað eftir hesum. Arbeitt verður við at fáa hesi viðurskiftini í rættlag, og eru partarnir um at koma á mál við hesum.

Trygdin í sambandi við sigling til Svínoy og Fugloy er ikki einans treytað av, at krøv til skipið og til raksturin av skipinum sambært løgtingslóg um trygd á sjónum verða fylgd. Umstøðurnar á atløguplássunum og útgerð á skipinum, tá ferðafólk skulu av og umborð á skipið, hava eisini nógv at siga fyri trygdina. Hetta kemur eisini fram í svarinum frá Strandfaraskipum Landsins til Den Maritime Havarikommission, sí s. 26 í frágreiðingini, har ymisk átøk verða nevnd, sum kunnu bøta um trygdina. Viðurskifti viðvíkjandi atløguplássunum og útgerð á skipunum, sum kunnu betra trygdina, hava útreiðslur við sær, og hesi viðurskifti hoyra undir ávikavist avvarðandi kommunur og Strandfaraskip Landsins ella landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur kunnað Fíggjarmálaráðið um málið soleiðis, at ráðið og Strandfaraskip Landsins kunnu viðgera spurningin, hvørjar mannagongdir, útgerð og ábøtur á skip og lending/havn, kunnu verða við til at gera viðurskiftini tryggari í Svínoy og Fugloy.“

Tann 21. apríl 2020 sendi eg hetta skriv til Umhvørvis- og vinnumálaráðið :

“ Umboðsmaðurin hevur heft seg við, at í váðametingunum verða ferðafólkini, ið skipini hava loyvið at taka við í mun til veðurlíkindini á staðnum, bólkað eftir aldri og førleika.

Umboðsmaðurin ynskir at fáa upplýst, hvussu hetta eftirlitið við ferðafólkum er skipað, og um tað verður skjalfest. “

Sama dag svaraði Umhvørvis- og vinnumálaráðið :

“Váðametingarnar skulu implementerast í ISM skipanina hjá reiðarínum. Sjóvinnustýrið upplýsur, at skipanin ikki skal góðkennast av Sjóvinnustýrinum. Reiðaríið, SSL, hevur ábyrgd av, at hetta verður implementerað, og at mannagongdirnar verða fylgdar.

UVMR vil mæla til, at Løgtingsins umboðsmaður vendir sær til SSL og møguliga Fíggjarmálaráðið við spurninginum um, hvussu reiðaríið skipar hetta í praksis.”

Tann 30. apríl 2020 send eg soljóðandi skriv til Fíggjarmálaráðið :

**“Viðvíkjandi trygdini, tá skip hjá Strandferðsluni leggja at í Svínoy og Fugloy:**
Í samband við at umboðsmaðurin tann 18. februar í ár fekk ein fyrispurning frá A um trygdina, tá skip hjá Strandferðsluni leggja at í Svínoy, sendi umboðsmaðurin spurningin til Umhvørvis- og vinnumálaráðið og spurdi, um ráðið metti, at verandi trygdarviðurskifti eru nøktandi ella um nakrar broytingar mugu gerast.

Tann 2. apríl sendi Umhvøris- og vinnumálaráðið umboðsmanninum frágreiðing um trygdarviðurskiftini. Í frágreiðingini við skjølum sæst m.a. at Sjóvinnustýrið hevur kravt SSL eftir eini endurskoðan av váðametingni fyri siglingina hjá Rituni til Svínoy og Fugloy, at nýggj váðameting er gjørd, og at arbeitt verður við at fáa váðametingina setta í verk. Ráðið vísur eisini á, at í frágreiðing, dagfest 13. august 2018, hevur Den Maritime Havarikommission víst á tiltøk bæði í mun til umstøðurnar á atløgplássunum og útgerðina á skipinum, sum kunnu betra um trygdina, men at hetta eru viðurskifti, sum hoyra undir avikavist avvarðandi kommunur og Strandfaraskip Landsins ella landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Vísandi til at Strandfaraskip landsins hoyrir undir landsstýrimannin í fíggjarmálum fer umboðsmaðurin at biðja Fíggjarmálaráðið greiða sær frá, hvørji trygdartiltøk eru sett í verk í mun til útgerðina á Rituni og atløguplássunum í Fugloy og Svínoy, síðan Havaríkommissiónin kom við síni frágreiðing 13. august 2018.

Í nýggju váðametingunum frá SSL, dagfestar 22. mars 2020, verða ferðafólkini, ið Ritan hevur loyvið av taka við í mun til veðurlíkindini á staðnum, bólkað eftir aldri og førleika. Fíggjarmálaráðið verður biðið um at greiða umboðsmanninum frá, hvussu hetta eftirlitið við ferðafólkum er skipað og um tað verður skjalfest.”

Við skrivi dagfest 10. juli 2020 svaraði Fíggjarmálaráðið:

**“Trygd hjá Strandferðsluni við atløgu**
Víst verður til skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 30. apríl, viðvíkjandi trygdini, tá skip hjá Strandferðsluni leggja at í Svínoy og Fugloy.

Fíggjarmálaráðið hevur samskift við Strandfaraskip landsins og Landsverk, fyri at svara spurningunum.

**Strandfaraskip landsins, generelt**

Strandferðslan fylgir galdandi rættarreglum og ásetingum, sum verða sett til ferðafólkaskip og ferðafólkaflutning, og hevur skyldu til støðugt at betra trygdina á øllum økjum.
Ritan er ferðafólkaskip, sum er góðkent til ferðafólkaflutning av klassafelagnum DNV GL (Det Norske Veritas/Germanischer Lloyd), vegna Sjóvinnustýrið. Tað at eitt skip er klassað, og góðkent til ætlaða raksturin, tryggjar altíð at øll viðurskiftir eru nøktandi, so hvørt sum skipið verður góðkent. Øll skip hjá SSL hava árligt trygdarsýn, bæði av Strandferðsluni sjálvari, og externt av klassafelagnum.
Strandfaraskip landsins meta, at Ritan sum heild hevur roynst væl, og er frægasta skip sum hevur røkt "Hvannasund -Svínoy/ Fugloy farleiðina". Ritan er umbygd nakað síðan hon kom í sigling har norðuri í 2010, og hevur tað serliga verið fyri at betra um trygdina hjá ferðandi, manning og skipi.

**Ritan, trygdartiltøk og útbúnaður**

Ongar beinleiðis broytingar eru gjørdar í konstruktiónini á Rituni síðan óhappið í mars 2018, tí Strandferðslan metir at útgerðin, sum skipið hevur er nøktandi. SSL hevur hinvegin tvífaldað talið av bátshakum um borð á skipinum.
Sambært Strandferðsluni krevur Sjóvinnustýrið ongantíð meira av einum skipi enn galdandi krøv í lóg, kunngerð, ella fráboðanum. Havaríkommissiónin hevur sambært SSL heldur ikki sett krøv til broytingar ella líknandi, men hevur serliga umrøtt, hvørji tiltøk kunnu setast í verk á landi.

**Tiltøk**

Strandferðslan arbeiðir støðugt við at betra arbeiðsviðurskifi og trygd á øllum leiðum á sjógvi og landi. Samskiftir og samstarvar við Sjóvinnustýrið, Landsverk og kommunur um havnir og atløgubryggjur og annað. Hetta er/verður gjørt:

- Allar váðametingar eru endurskoðaðar og síðan gjøgnumgingnar á fundi við Sjóvinnustýrið. Viðvíkjandi leið 58 skrivar Sjóvinnustýrið í teldubrævi 10. juni 2020, at váðametingarnar fyri leið 58 eru framdar, manningin kunnað, og trygdarskipanin hjá SSL tillagað samsvarandi.
  Viðvíkjandi at bólka ferðafólk eftir aldri og førleika, ið Ritan kann taka við, í mun til veðurlíkindini, ætlar SSL ikki at hava beinleiðis eftirlit, men at upplýsa og tilmæla fólki um tað er ráðiligt hjá teimum at fara. Uppsløg við vegleiðing til ferðandi og upptøkum av øllum atløgum á leið 58, verður eftir ætlan nýtt sum kunnandi tilfar.
- SSL hevur sett upp vevmyndatól á øllum lendingum á leið 58. Tessvegna hevur skiparin munandi betri umstøður at meta um líkindini at sigla og leggja at.

**Atløgubryggjur**

Kommunurnar hava ábyrgdina av atløgubryggjunum í Svínoy (Klaksvíkar kommuna), og Fugloy (Fugloyar kommuna), og skulu í prinsippinum fíggja útbyggingar og ábøtur sum verða gjørdar.
Ein akfarsskrái er gjørdur á bryggjuni á Eiðinum í Svínoy, sum var liðugur í 2018, sum bøtir um atløguviðurskiftini. Hetta var eitt samstarv millum Klaksvíkar kommunu og Landsverk.
Havnaviðurskiftini eru annars at kalla onki bøtt í Svínoy og Fugloy síðan august 2018.

**Kirkja**

Atløguviðurskiftini á Kirkju eru ikki nøktandi. Bryggjukanturin er avrundaður og brýndur, og koma fleiri armerings jarnstengur út úr betong flatuni.
Eftir uppriti frá SSL til FMR um lendingin á Kirkju, dagfest 30. mars 2020, er niðurstøðan, at fyri at tryggja at ferðafólk kunnu ferðast á ein tryggan hatt, eigur ikki at verða siglt á Kirkju fyrr enn lendingar viðurskiftini eru bøtt, soleiðis at:

- Bryggjukanturin er fullkomiliga rættvinklaður, og
- Ongin armering skal vera til ampa hjá skipinum, undir atløguni.

Ætlanin er at gera eina fyribils loysn í summar, soleiðis at atløguviðurskiftini verður tryggari, og hava SSL og LV avtalað, at bryggjukanturin verður umvældur. Fíggjarmálaráðið hevur samstundis heitt á Landsverk, um at arbeiða við eini varandi loysn fyri atløgubryggjuna í samstarvi við SSL og kommununa.“

Sambært frágreiðingunum, ið eg havi móttikið frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum sæst, at tað verður støðugt arbeitt við at bøta um trygdina í sambandi við siglingina hjá Rituni til Svínoy og Fugloy m.a. við at betra um útgerðina á skipinum, endurskoða allar váðametingarnar og tillaga trygdarskipanina hjá Strandferðsluni samsvaraðandi. Broytingar eru gjørdar, so skiparin hevur betri umstøður at meta um líkindini at sigla og leggja at.

Sum almenni bygnaðurin er skipaður, eru trygdarviðurskiftini í samband við siglingina og atløgu hjá Rituni í Svínoy og Fugloy ein spurningur, sum fleiri myndugleikar hava leiklut í. Ábyrgdin av eftirlitinum, sambært lógini um trygd á sjónum við skipum og bátum, er løgd til Sjóvinnustýrið, her undir eisini eftirlitið við skipunum hjá Strandferðsluni. Sjóvinnustýrið hoyrir undir Umhvørvis- og vinnumálaráðið, meðan Strandferðslan hoyrir undir Fíggjarmálaráðið. Hartil kemur at kommunurnar hava ábyrgd av atløguviðurskiftunum á landi.

Eg havi ikki grundarlag fyri at siga, at mynduleikabygnaðurin er ein trupulleiki á hesum øki. Men eg kann staðfesta, at myndugleikarnir áhaldandi tykjast at arbeiða við at betra um trygdarviðurskiftini, og taki tí frágreiðingarnar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum til eftirtektar og sum ein vissa um, at ábyrgdarhavandi myndugleikar hava eftirlit við trygdarviðurskiftunum. Eg geri tí ikki meira við hetta málið.

Eg fari tó at biðja Fíggjarmálaráðið lata meg frætta um kunningarskipanina til ferðafólk við Rituni, tá Strandferðslan hevur sett hesa í verk.

Skrivið verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara í navnleysum líki.

Avrit av hesum skrivi er sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum til kunningar.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður